


# Jason Watt 40 ár



*Myndin er tikin, tá Jason Watt var í Føroyum í mars mánað í fjør. Her er hann saman við Bent á Lava, stjóra hjá Balslev, Heina Festirstein og Jan Petersen*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Í dag fyllir kendi danski rasarakoyrarin Jason Watt 40 ár.

Jason Watt er føddur í London 24. februar 1970. Mamman er donsk og pápin onglendingur.

Jason hevur meginpartin av lívi sínum búð í Danmark. Hansara yrkisleið sum kappkoyrari byrjaði, tá hann sum 10 ára gamal var við til fleiri gokart kappingar við sera góðum úrslitum og vann fleiri meistarskap. Longu tá setti hann sær fyri, at hann ein dag skuldi verða formel 1 koyrari.

Hann helt á at koyra kapp og fór frá gokartum til bilar. Hann arbeiddi seg upp innan motorsportin, og beint sum dreymurin um at gerast formel 1 koyrari skuldi gerast veruleiki, kom hann út fyri eini álvarsligari ferðsluvanlukku á motorsúkklu tann 13. oktober 1999, tá hann varð lammaður frá bringuni og niðureftir.

Jason Watt kom tó skjótt fyri seg aftur. Hann skrivaði heimssøgu, tá hann í 2002 verður DTC-meistari (Danish Touringcar Championship). Tað er ongantíð hent áður innan altjóða motorsportin at ein avlamin kappkoyrari hevur vunnið eitt professionelt meistaraskap. Í Onglandi varð hann heiðraður av fyrrverandi formel 1 koyraranum Sir Jackie Stewart, og í Danmark kemur hann inn á eitt 7. pláss yvir best umtóktu persónar í landinum.

Jason Watt var í Føroyum í mars í fjør í sambandi við at Balslevs Timburhandil og Bygma í Hoyvík lótu upp nýggjan handil. Hann helt eisini fyrilestur um sítt lív fyri umleið 300 fólkum á Hotel Føroyum. Bygma A/S hevur gjørt sponsoravtalu við rasarakoyraran og hansara team, sum eitur Team BYGMA Jason Watt Racing.

Jason Watt hevur skrivað bókina „Fordi jeg vil“, sum er um hvussu hann eftir vanlukkuna aftur kundi luttaka í motorsportinum. Hann er eisini kendur sum fyrilestrarhaldari, eins og hann ofta er við í radio og sjónvarpssendigum.

*mg*

# Koyriteknisk breyt og Würth í Bilradio

**Hósdagin 25. februar kl. 16.10**




*Claus Christensen deildarstjóri hjá Würth í Føroyum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin 25. februar er samrøða við Claus Christensen, sum er settur sum deildarstjóri hjá Würth í Føroyum. Claus sigur frá um hvat Würth er og stendur fyri, og hvussu Würth arbeiðir í Føroyum. Würth hevur síðan 1998 havt sølufólk í Føroyum.

Í sambandi við at ein frágreiðing er handað Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í innlendismálum, frá arbeiðsbólkinum sum hon setti í august 2009 at kanna møguleikarnar fyri koyritekniskari breyt í Føroyum, er ein samrøða við Hans Jacob Hermansen, fyrrverandi koyrilærara, sum saman við øðrum hevði eina ætlan um eina koyritekniskabreyt í høvuðsstaðarøkinum fyri fimm árum síðan.

Eisini er prát við Sølva Reinert Hansen frá Ferðslutrygd um at 1000 føroyingar hava fingið eitt spurnarblað frá Norðurlendska Ferðslutrygdarráðnum NTR. Sølvi sigur, at higartil eru 350 spurnarbløð komin inn aftur. Hóast freisitin er úti, vónar hann at tey sum hava fingið spurnarbløðini lata tey inn beinanvegin. Sølvi leggur afturat, at spurnarbløðini eru anonym.

*mg*



*Hans Jacob Hermansen fyrrverandi koyrilærari*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Sølvi Reinert Hansen stjóri í Ferðslutrygd*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*